# Uppsøgnin stendur við

**Á stýrisfundi hjá SEV í gjár samtykti meirilutin í stýrinum at handa Klæmint Weihe, stjóra, endaligu uppsøgnina**

SEV-STRÍÐ
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Eftir ein heldur drúgvan fund, har tosað varð við stórum bókstavum, og stýrislimirnir slongdu ákærur hvør eftir øðrum, var greitt, at stýrið fór at handa Klæmint Weihe endaliga uppsøgn, sum kemur í gildi komandi mánadag.

### Minnilutin kært

LeivurHansen, fyrrverandi stýrisformaður, segði eftir fundin, at minnilutin í stýrinum hevði kært uppsøgnina av stjóranum til umboðsnevndina sambært grein 4, stk. 8 í viðtøkunum fyri SEV.

Har stendur: Krevur umboðsnevndarformaðurin ella minst 3 stýrislimir, at mál skal verða lagt fyri umboðsnevndina, má málið, sjálvt um stýrið hevur tikið sína avgerð, ikki verða framt, fyrr enn umboðsnevndin hevur gjørt málið av.

Sambært hesum skuldi tað verið greitt, at endaliga uppsøgnin av Klæmint Weihe ikki kann verða framd í verki, fyrr enn stýrið hevur tikið støðu til kæruna frá minnilutanum í stýrinum. Men hesum er meirilutin í SEV-stýrinum við Kim Durhuus, formanni, á odda, ikki samdur í, og teir hava tí gjørt av at senda Klæmint Weihe til hús mánadagin.



*Fyrst var Leivur Hansen formaður í SEV-stýrinum, og so bleiv Kim Durhuus tað. Fríggjadagin verður umboðsnevndarfundur, og eftir tann fundin kann væl verða, at hvørgin teirra er formaður í SEV-stýrinum.*

*Mynd: Terji Nielsen*

### Fríggjadagurin verður avgerandi

Henda stóra fløkjan í SEV-stýrinum verður tó væntandi eitt sindur greiðari fríggjadagin, tá ið umboðsnevndin hittist til fundar.

Á dagsskránni fyri fundin fríggjadagin er millum annað val av nýggjum stýri og møguliga stýrisformanni, og tað kann eisini enda við vali av nýggjum umboðsnevndarformanni.

Í sambandi við umboðsnevndarfundin hevur minnilutin í SEV-stýrinum biðið um, at Klaus Rasmussen, grannskoðari, Jógvan Ellefsen, løgfrøðingur, Jógvan Páll Lassen, løgfrøðingur, John P. Danielsen, fyribilssettur stjóri og Klæmint Weihe sleppa at verða við á fundinum og svara spurningum frá umboðsnevndarlimunum.

Hvussu leikur fer, er ilt at spáa um, men tað hevur ljóðað, at Leivur Hansen hevur breiðan stuðul í umboðsnevndini, og tí er ikki óhugsandi, at ein stórur partur av stýrinum verður sendur til hús, og nýggjur formaður verður valdur. Livst so spyrst.

# KJ-Contractors fingið stykki til íbúðarbygging




*Tað er her á trøðni Undir Gráasteini, at KJ-Contractors fer at byggja einar 72 eigaraíbúðir*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Nógv umrøddu ætlanirnar hjá KJ-Contractors um íbúðarbygging millum Horna kunnu nú fara í gongd**

ÍBÚÐARBYGGING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Á býráðsfundi í gjár samtykti Tórshavnar Býráð nevnliga at selja KJ-Contractors eina trøð, sum er góðar 10.000 fermetrar til støddar, og sum hevur verið partur av byggiætlanini. Upprunaliga var ætlanin hjá KJ-Contractors bert at keypa ein part av trøðni, men loysnin bleiv so, at teir keyptu alla trøðna fyri 11,2 milliónir krónur.

Í sambandi við søluna av trøðni hevur Tórshavnar Býráð sett sær tað treyt, at bygt verður á staðnum innan tvey ár.

# Nýggjur skúli byggjast á Argjum

**Tórshavnar Býráð samtykti í gjárkvøldið at keypa CEPA-trøðna á Argjum og byggja ein nýtmótans tvísporaðan skúla á staðnum**

SKÚLABYGGING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Tað er á hesum stykkinum beint oman fyri Hebron og Dagstovnin á Argjum, at nýggi skúlni verður bygdur.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tað hevur annars leingi ligið í kortunum, at kommunan fór at umvæla og útbyggja Argja Skúla, tí at hann er ov lítil og trongur. Men við tí vøkstri í fólkatalinum, sum er væntandi á Argjum næstu árini, fer tann loysnin neyvan at loysa trupulleikan, og harafturat verður hon ógvuliga kostnaðarmikil.

### Nógv betur loysn

Heðin Mortensen, borgarstjóri, sigur, at tað hevur leingi verið arbeitt við ætlanini um at útbyggja Argja Skúla, men hetta hevði kostað einar 60 milliónir krónur, og framvegis hevði skúlin verið gamal og trongur.

– Skúlin á Argjum liggur eisini serstakliga trongt fyri, og har eru nógvir trupulleikar við ferðsluni. Nú er ætlanin ístaðin at byggja ein nýggjan og nýmótans tvísporaðan skúla beint oman fyri Hebron og Dagstovnin á Argjum. Hetta er ein nógv betur loysn upp á allar mátar, sigur Heðin Mortensen.

Enn er ikki nøkur kostnaðarmeting gjørd fyri nýggja skúlan, men borgarstjórin sigur seg vænta, at hann kemur at kosta eitt stað millum 80 og 100 milliónir krónur.

– Hann verður neyvan nógv dýrari enn ætlaða útbyggingin av Argja Skúla, og royndirnar úr Kollafirði hava jú lært okkum, hvørjir trupulleikar kunnu stinga seg upp, tá ið valt verður at útbyggja ein skúla, sigur Heðin Mortensen.

Í sambandi við nýggja ringvegin, ið verður gjørdur út á Argir, kemur nýggi skúlin at liggja serstakliga væl fyri, tí ringvegurin kemur at ganga beint undir skúlanum.

### Gamli skúlin mentanarmiðdepil

Heðin Mortensen sigur, at av tí at nýggi skúlin verður tvísporaður, fer tann gamli bert at hava eitt spor. Eisini verður fimleikahøll bygd í nýggja skúlanum, og tað fer at lætta um trýstið á fimleikahøllina í Argja Skúla. Á henda hátt fer gamli skúlin ikki at verða eins nógv bundin av ymsum tiltøkum og útleigan, sum hann hevur verið, og hetta ætlar býráðið at gera sær dælt av.

– Vit ætla, at tann gamli skúlin á Argjum skal gerast eitt slag av einum mentanarmiðdepli fyri Argja bygd, greiðir Heðin Mortensen frá.

Enn er ikki greitt, nær tað fer at bera til at fara undir at byggja nýggja skúlan, og tí er ilt at siga, nær nýggi skúln verður liðugur.